

## Stríð um góðshavn

Herfyri kom fram, at havnin í Aalborg er til reiðar at gera íløgur í eina góðshavn í Nuuk. Hugskotið fekk sera góða móttøku í grønlendska høvuðsstaðnum, men fagnaðurin er fánaður eitt sindur, nú landsstýrið hevur gjørt vart við, at tað arbeiðir við at skipa eitt felag, sum skal eiga og reka havnir um alt Grønland. Nikolaj Heinrich, borgarstjóri í Nuuk, sigur, at hetta samsvarar ikki við ætlanina at geva kommunum størri sjálvræði.

# Javnstøðunevndin fer í rættin við málinum



*Málið um Óluvu Hansen úr Nólsoy endar eftir øllum at døma í Føroya Rætti. Arbeiðsgevarin vil ikki gera eftir kravboðum frá Javnstøðunevndini, og tí skal málið leggjast fyri ein dómara*

*Mynd: Jens Kr.istian Vang*

**Málið um uppsøgnina Óluvu Hansen fær nú eitt eftirspæl í Føroya Rætti. Javnstøðunevndin fer at føra málið í rættinum, eftir at arbeiðsgevarin, bakaríið Grón, hevur boðað frá, at hann ikki fer at rinda tær 140.000 krónurnar, sum Javnstøðunevndin metir, at Óluva Hansen hevur rætt til**

ENDURGJALD

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð síðan javnstøðulógin varð samtykt, fer Javnstøðunevndin at føra eitt mál í Føroya Rætti.

Stjórin í Grón, Regin Nielsen, boðaði í fjølmiðlunum í gjár frá, at felagið ikki fer at rinda Óluvu Hansen tær 143.500 krónurnar, sum Javnstøðunevndin hevur álagt felagnum at rinda.

Óluva Hansen var í læru sum bakari hjá Grón inntil í mars í fjør. Umleið tveir mánaðir eftir at hon hevði boðað arbeiðsgevaranum frá, at hon var vorðin við barn, fekk hon eina skrivliga uppsøgn, har grundgevingarnar vóru "vantandi uppmøting, tvørrandi samskifti við meistara og ov langar roykipausur".

Javnstøðunevndin metti tó, at veruliga orsøkin til uppsøgnina var, at hon var við barn, og hetta er brot á javnstøðulógina. Tí hevur Javnstøðunevndin álagt Grón at rinda 143.500 krónur.

### Javnstøðunevndin fer víðari við málinum

Kári á Rógvi, formaður í Javnstøðunevndini, upplýsir fyri Sosialinum, at málið nú skal roynast í Føroya Rætti.

Paragraf 12 í javnstøðulógini sigur, at um javnstøðunevndin heldur, at framferðarhátturin hjá einum arbeiðsgevara er í stríð við lógina, og arbeiðsgevarin eftir áheitan ikki vil fylgja niðurstøðuni hjá nevndini, kann hon "leggja málið fyri rættin í borgarligari rættargangssókn um, at framferðarhátturin hevur verið í stríð við lógina."

Og tað er júst hetta, sum Javnstøðunevndin nú ger.

- Vit fara at føra málið í rættinum. Allar lógir hava tulkingarúva, og tí vilja vit hava rættin at taka støðu í hesum málinum. Vit hava nógv líknandi mál frá øðrum Norðurlondum, sum vit fara at nýta sum fordømi, sigur Kári á Rógvi.

Hann leggur afturat, at hesi fordømi ikki eru bindandi fyri Føroya Rætt, men skulu nýtast til at sannføra rættin um, at Javnstøðunevndin hevur grein í sínum máli.

Málið hjá Óluvu Hansen er soleiðis háttað, at arbeiðsgevarin skal prógva, at orsøkin til uppsøgnina ikki er, at hon var við barn. Hetta verður á løgfrøðiligum máli nevnt umvend próvbyrða, av tí at arbeiðsgevarin skal prógva, at hann ikki hevur brotið lógina.

- Grón hevur nú ført eini seks ymiskar frágreiðingar fram, og tí hava vit ikki mett, at teirra frágreiðingar hava verið sannførandi, sigur Kári á Rógvi.

Hann sigur, at tað kann væl vera, at Grón í rættinum fer at leggja onnur meira sannførandi prógv fram. Tí er tað ikki ósannlíkt, at nýggjar upplýsingar fara at koma fram.

Í hinum Norðurlondunum er tað vanligt, at partarnir semjast um eina lægri upphædd, áðrenn málið kemur fyri í rættinum, og tað kann eisini henda í hesum málinum.

- Hetta merkir, at vit ikki fáa høvi at royna nakrar prinsipiellar tulkingar, men tað mugu vit so liva við, sigur Kári á Rógvi.

Formaðurin í Javnstøðunevndini leggur afturat, at hann fegnast um, at kvinnur vilja trína fram í fjølmiðlunum, tí tað er ein trupulleiki, at nógvir arbeiðsgevarar ikki kenna lógir og reglar á hesum økinum.

Javnstøðunevndin hevur fingið ein advokat at føra málið fyri nevndina og fer at leggja tað fyri Føroya Rætt ein av komandi døgunum.



# Búskapargrunnur í buktini

**Sambandsflokkurin streingir á fyri at fáa búskapargrunn settan á stovn. Hinir flokkarnir tykjast meira trekir til at góðtaka tann leist, ið Sambandsflokkurin leggur fyri dagin. Lyftið um búskapargrunn var eitt av teimum týðandi lyftunum hjá Sambandsflokkinum í valstríðnum**

SAMRÁÐINGAR

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Stígur kom eftir øllum at døma í samráðingarnar millum ABC-flokkarnar í gjár, tá nakrir av teimum tungu fíggjar- og búskaparligu spurningunum vórðu viðgjørdir.

Eitt av aðalmálum Sambandsfloksins í valstríðnum var, at komandi landsstýri skal føra ein konjunkturjavnandi búskaparpolitikk, og at besta amboðið til hetta er at seta á stovn ein búskapargrunn.

Valskrá Sambandsfloksins legði upp til, at landskassin skal leggja pening til síðis í góðum tíðum, og at goymslurnar skulu fyllast. Tann konjunkturjavnandi politikkurin hevur til endamáls at tálma sveiggjunum í búskapinum við íløgum á fíggjarlógini, og tað merkir, at landið skal halda aftur í góðum tíðum, og føra ekspansivan búskaparpolitikk í ringum tíðum. Poengið er, at landið altíð skal hava pengar til taks, tá tíðirnar gerast verri.

Magni Laksáfoss, ið eru búskaparfrøðingur, hevur verið heitur talsmaður fyri einum búskapargrunni, og hann hevur undir samráðingunum hildið fyrilestur fyri tingmonnum um, hvussu ein slíkur búskapargrunnur kann skipast.

### Ósemja

Allir flokkar hava tó ikki verið líka heitir fyri ætlanunum hjá Sam-bandsflokkinum. Vandin er, at bráfeingis trupulleikar, sum krevja nógvar pengar at loysa beint her og nú, ikki fáa nóg stóra játtan, av tí at peningurin ístaðin verður settur í búskapargrunnin.

Gerhard Lognberg segði við Rás 2 í gjár, at hann óttaðist fyri, at pengar ikki fóru at vera til sandoyartunnilin, um hundraðtals milliónir krónur skulu bindast í einum búskapargrunni á hvørjum ári. Henda ótta góvu aðrir tinglimir eisini til kennar í tinginum hósdagin.

Sum skilst leggur uppskot Sambandsfloksins upp til, at eini 200 milliónir krónur skulu setast í búskapargrunnin á hvørjum ári, og at pengarnir ikki skulu nertast komandi 20-30 árini. Hetta hava vit tó ikki fingið váttað frá nøkrum Kaj Leo Johannesen, formanni Sambandsfloksins, ella Magna Laksáfoss.

Tjóðveldi legði eitt uppskot um búskapargrunn fyri tingið fyri einum ári síðani. Tað innibar, at serinntøkur frá einskiljingum og møguligar oljuinntøkur skuldu setast í grunnin.

Tann norski búskapargrunnurin verður ofta tikin fram sum dømi um slíkar grunnar. Norski petroleumsgrunnurin hevur í løtuni umleið 1.800 milliardir norskar krónur, og norski staturin kann bert nýta fýra prosent av avkastinum úr grunninum á fíggjarlógini hvørt ár.